# P/F VÁGATUNNILIN

## TÓRSHAVN

## ÁRSROKNSKAPUR

## 2004

**(6. ROKNSKAPARÁR)**

**AVRIT**

# INNIHALDSYVIRLIT


| | Síða |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Ársfrágreiðing | 3 |
| Leiðsluátekning | 4 |
| Grannskoðanarátekning | 4 |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 - 6 |
| Rakstrarroknskapur 2004 | 7 |
| Fíggjarstøða pr. 31. desember 2004 | 8 - 9 |
| Gjaldførisfrágreiðing 2004 | 10 |
| Notur | 11 - 12 |
| Eventualskyldur og tryggingarviðurskifti | 13 |

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

**Felagið**

| | |
|---|---|
| Navn: | P/F Vágatunnilin |
| Heimstaður: | FO-100 Tórshavn |
| Skattakommuna: | Tórshavnar Kommuna |
| Stovningardagur: | 21. desember 1998 |
| Roknskaparár: | 1. januar til 31. desember |
| V-tal: | 485.209 |

**Nevndin**

Bergur í Garði, búskaparfrøðingur, Tórshavn, formaður
Jens Kári Vilhelm, verkfrøðingur, Hoyvík, næstformaður
Oyvindur Brimnes, verkfrøðingur, Argir
Bjarni Askham Bjarnason, búskaparfrøðingur, Tórshavn
Dánjal Thomsen, fíggjarleiðari, Sandavágur

**Stjórn**

David Reinert Hansen, verkfrøðingur, Oyri, stjóri

**Fíggjarleiðari**

Reinhold Isaksen, búskaparfrøðingur, Norðragøta

**Grannskoðan**

P/F Grannskoðaravirkið ***INPACT***
statsaut. revisorar
R. C. Effersøesgøta 26
Postrúm 191, FO-110 Tórshavn
Tlf.: 31 47 00 - Fax: 31 38 15
T-postur: inpact@inpact.fo
Heimasíða: www.inpact.fo

Ársroknskapurin 2004 er góðkendur á felagsins aðalfundi, hin 27. juni 2005.

_________________________
fundarstjóri

## ÁRSFRÁGREIÐING 2004

**Virksemi**
Endamál felagsins er at útvega fast samband millum Streymoy og Vágoy, hava rakstur og fasta sambandið um hendi, umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið. Felagsins virksemi í farna ári hevur í høvuðsheitum verið rakstur av innkrevjingarskipan og tunli, at hava eftirlit við byggiarbeiðinum, fyrireika tilbúgvingarætlan og gera byggiarbeiðið liðugt. Undirsjóvartunnilin varð latin upp fyri almennari ferðslu 10. desember 2002.

**Lógargrundarlag**
Partafelagið varð stovnað við 20,3 mió.kr. í løgujáttan á fíggjarløgtingslógini og eykajáttanarlógini fyri 1998. Ognarrættur, eftirlit, peningajáttan 160,3 mió.kr., krøv til felagið, nýtslugjøld, ognartøka, skattlig viðurskifti, eftiransing og kunning verða formaliserað í Ll. nr. 6 frá 08.02.2000 (Anleggslógin) um ”fast samband um Vestmannasund”.

**Fíggjarliga gongdin**
Við nakað størri ferðslu enn árið fyri (í miðal umleið 1.000 akfør/dag í mun til mett umleið 880), gjørdist umsetningurin – hóast príslækking – nakað tann sami sum árið frammanundan. Kostnaðurin til vanliga raksturin gjørdist á leið sum væntað, tó gjørdist upphæddin til eftiransing á gjaldstøðini og til uppfylging í hesum sambandi størri enn ætlað fram til 1. novmber 2004, tá gjaldsautomatin varð tikin úr nýtslu og lagt varð um til heilautomatiska innkrevjing.

**Menningarkostnaður**
Felagið hevur havt ávísan kostnað til at broyta viðtøkur við partapeningshækking, kunnandi tiltøk og tilfar.

**Íløgur**
Felagið hevur í árinum gjørt íløgur fyri 2,5 mió.kr. í arbeiði uppá sjálvan undirsjóvartunnilin við tilhoyrandi vegum, brúgvum, rakstrartólum, innbúgvi og tøkni.

**Hendingar aftaná roknskaparárslok**
Frá statusdegnum og til í dag er einki hent, sum avgerandi broytir metingina av ársroknskapinum. Á eykaaðalfundi tann 25. januar 2005 var partapeningurin hækkaður við síðstu 20 mió.kr. upp í 160,3 mió.kr.

**Framtíðarútlit**
Við óbroyttum prísum hevði verið roknað við heldur minni ferðslu í 2005, men við príslækkingini, ið er galdandi frá 17. januar 2005, verður mett, at ferðslan verður á leið tað sama, meðan inntøkurnar væntast at falla nakað.

**Partaeigaraviðurskifti**
Partapeningurin er kr. 140.300.000. Allur partapeningurin er ogn landsins. Í árinum er, við aðalfundarsamtykt frá 19. januar 2004, partapeningurin hækkaður við 20 mió.kr. við játtan á fíggjarløgtingslógini fyri 2004.

**Býtið av ársúrslitinum**
Ársúrslitið er **kr. 359.741**, ið nevndin mælir til at býta soleiðis

| | |
|---|---:|
| Flutt úrslit frá undanfarnum árum | -2.950.647 |
| Ársúrslit 2004 | 359.741 |
| **At flyta til næsta ár** | **-2.590.906** |

**Eginpeningurin** verður nú **kr.** **137.709.094**

**LEIÐSLUÁTEKNING**

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársroknskapin við ársfrágreiðingini fyri 2004 hjá P/F Vágatunlinum.

Ársroknskapurin er settur upp samsvarandi ásetingum í galdandi ársroknskaparlóg.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Ársfrágreiðingin og ársroknskapurin fyri 2004 verða hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, hin 27. juni 2005

Stjórn: David Reinert Hansen

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nevnd: | Bergur í Garði<br>formaður | Jens Kári Vilhelm<br>næstformaður | Oyvindur Brimnes |
| | Bjarni Askham Bjarnason | | Dánjal Thomsen |

**GRANNSKOÐANARÁTEKNING**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Vágatunlinum, Tórshavn, fyri 2004, sum leiðslan hevur sett upp.

**Grannskoðanin**
Í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarmeginreglur hava vit lagt til rættis og framt grannskoðanina við atliti at fáa grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi skeivleikar ella vanta týðandi upplýsingar í ársroknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og váða, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í ársroknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt. Eisini hava vit mett um, hvørt upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvari við tey krøv, ið føroyska lóggávan setur roknskaparhaldi, og at hann gevur rætta mynd av felagsins ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Tórshavn, hin 27. juni 2005

**P/F Grannskoðaravirkið** ***INPACT***
statsaut. revisorar

Jógvan Amonsson Alvi S. S. Nielsen

statsaut. revisor 			skrás. grannskoðari

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

**Alment**
Roknskapurin er uppsettur eftir galdandi partafelags- og ársroknskaparlóg og roknskaparkunngerð. Rakstrarroknskapurin er uppsettur eftir greinbýttum frásøguhátti og fíggjarstøðan eftir kontuhátti. Roknskaparhátturin er óbroyttur frá árinum fyri, tó er tíðaravmarking gjørd fyri frammanundangoldin kubbahald.

**Inntøkur og kostnaður**
Inntøkur og kostnaður, ið hoyrir árinum til, verður rakstrarførdur við tíðaravmarkingum.

**Rentur**
Rentuinntøkan samsvarar tilskrivaðu rentu á innlánskontum felagsins í 12 mánaði tíðarskeiðinum í árinum. Rentukostnaðurin av lánum, ið tikin eru upp, er roknaður fram til árslok, svarandi til roknskaparárið og bókaðar undir tíðaravmarkingum.

**Skattur**
Eingin skattur av ársins skattskyldugu inntøku áhvílir felagnum. Útsettur skattur verður roknaður og avsettur við 20% av skattligum meiravskrivingum, í mun til roknskaparligu avskrivingarnar á materiellari støðisogn í árinum og undanfarin ár.

**Materiell støðisogn**
Vegir, brúgvar, undirsjóvartunnil, tekniskur útbúnaður, tøkni, rakstrartól og innbúgv eru tikin við til útvegnarvirði, frádrigið avskrivingar. (Scrap-) avhendingarvirðið, sambært § 1,4 í ”Anleggslógini”, er sett til 160.300.000 kr.

Fyri ógoldna partapeningin frá 01.01.2003 er renta roknað og ognarførd fram til síðsta gjald hin 01.02.2005. Hesar roknaðu rentur verða mótroknaðar í rentukostnaðinum í nevnda tíðarskeiði. Tilsamans eru renturnar kr. 3.488.333.

Tól, ið kosta minni enn kr. 20.000, verða kostnaðarførd.

Avskrivingarnar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð og restvirði (livitíð) og verða gjørdar við eins stórum árligum prosentparti. Fyrsta árið verður avskrivað frá keypsmánaðinum:

| | |
|---|---|
| Vegir og undirsjóðartunnil | 10 - 14 ár |
| Tøkniútbúnaður | 3 - 5 ár |
| Rakstrartól | 5 ár |
| Innbúgv | 10 ár |

**Vørugoymsla**
Kubbar á goymslu eru tiknir við til útvegnarvirði og uppgjørt eftir FIFO-háttinum. Um realisatiónsvirði er lægri, verður goymslan tilsvarandi niðurskrivað.

**Áogn**
Tilgóðahavandi áogn er tikin við til áljóðandi virði. Avsett verður ímóti neyðugum tapsvanda.

**Vøru- og tænastuskuld**

Vøru- og tænastuskuld er tikin við til áljóðandi virði. Avmarkaða skuldin í fremmandum gjaldoyra er tikin við til kurs gjaldsdagin. Kursvinningur og kurstap, bæði ásannað og ikki ásannað, eru tikin við í rakstrarroknskapinum.

**Frammanundangoldin kubbahald**
Frammanundangoldin kubbahald eru tikin við til áljóðandi virði frá byrjan og fram til roknskaparárslok.

**Trygd, kubbar**
Trygd, kubbar eru tiknir við til áljóðandi virði, svarandi til kr. 300 fyri hvønn teknaðan kubba.

**Veðhalds- og eventualskyldur**
Veðhalds- og eventualskyldur eru upplýstar og avsettar eftir neyðugum tørvi aftast í ársroknskapinum.

**Gjaldførisfrágreiðing**
Gjaldførisfrágreiðing er uppsett eftir óbeinleiðisháttinum og vísir gjaldførisávirkan frá rakstri, íløgum og fígging. Gjaldførið við ársbyrjan og við ársenda eru samansett av tøkum peningi, frádrigið saldu á rakstrarláni.

**RAKSTRARROKNSKAPUR 2004**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | t.kr. |
| | Nota | 2004 | 2003 |
| **Nettosøla** | | **26.338.830** | **27.748** |
| Endurgjald, rakstrar- og fyrisitingarkostnaður | | 1.440.066 | 953 |
| Rakstrarkostnaður | | -5.700.228 | -5.363 |
| Fyrisitingarkostnaður | | -1.185.579 | -1.077 |
| **Bruttoúrslit** | | **20.893.089** | **22.261** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -2.681.716 | -2.466 |
| Avskrivingar | 2 | -12.314.387 | -12.018 |
| **Úrslit, frá primerum rakstri** | | **5.896.986** | **7.778** |
| Rentuinntøkur | | 15.186 | 201 |
| Rentukostnaður | | -6.047.727 | -9.079 |
| **Úrslit, áðrenn óvanligar postar** | | **-135.555** | **-1.100** |
| Óvanligar inntøkur | | 602.144 | 0 |
| **Úrslit, áðrenn skatt** | | **466.589** | **-1.100** |
| Skattur | 5 | -106.848 | 0 |
| **Ársúrslit** | | **359.741** | **-1.100** |

Býtið av ársúrslitinum sæst í ársfrágreiðingini.

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2004

| OGN | Nota | 2004 | t.kr. 2003 |
|---|---|---|---|
| Lendi, vegir og undirsjóvartunnil | | 279.367.044 | 288.282 |
| Tøkniogn | | 2.409.375 | 3.206 |
| Rakstrartól og innbúgv | | 447.895 | 548 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | 2 | **282.224.315** | **292.036** |
| Kubbar | | 95.828 | 0 |
| **Vørugoymslur tilsamans** | | **95.828** | **0** |
| Vøru- og tænastuáogn | | 1.238.135 | 593 |
| P/F Norðoyatunnilin, millumrokning | | 729.891 | 2.010 |
| Meirvirðisgjald | | 151.277 | 1.540 |
| Tíðaravmarkingar | | 8.000 | 8 |
| **Áogn tilsamans** | | **2.127.303** | **4.150** |
| Innlánspeningur | | 4.292.940 | 10.208 |
| **Peningur tilsamans** | | **4.292.940** | **10.208** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **6.516.071** | **14.358** |
| **OGN TILSAMANS** | | **288.740.386** | **306.394** |

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2004

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | t.kr. |
| **SKYLDUR** | Nota | 2004 | 2003 |
| Partapeningur | 3 | 140.300.000 | 120.300 |
| Flutt úrslit | 4 | -2.590.906 | -2.951 |
| **Eginpeningur tilsamans** | | **137.709.094** | **117.349** |
| Avsett til eventualskatt | | 106.848 | 0 |
| **Avsetingar tilsamans** | 5 | **106.848** | **0** |
| Íleggingargrunnurin fyri Føroyar | | 108.864.475 | 149.801 |
| **Langfreistað skuld** | 6 | **108.864.475** | **149.801** |
| Avdráttir, veðskuld næsta ár | 6 | 32.500.000 | 25.199 |
| Fallin terminsgjøld | | 0 | 1.076 |
| Roknað renta veðlán | | 373.045 | 1.337 |
| Roknað renta ógoldin partapeningur | | 83.333 | 1.183 |
| Avsett frítíðarløn | | 35.635 | 30 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 4.298.055 | 7.349 |
| Frammanundangoldin kubbahald | | 3.811.401 | 2.260 |
| Trygd, kubbar | | 958.500 | 810 |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **42.059.969** | **39.244** |
| **Skuld tilsamans** | | **150.924.444** | **189.045** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | | **288.740.386** | **306.394** |

## GJALDFØRISFRÁGREIÐING 2004

| | | |
|---|---|---|
| | | t.kr. |
| | 2004 | 2003 |
| Úrslit, av primerum rakstri | 5.896.986 | 7.778 |
| Avsett frítíðarløn | 5.346 | 0 |
| Avskrivingar | 12.314.387 | 12.018 |
| | **18.216.719** | **19.796** |
| Broytingar í ogn í umferð | | |
| Vørugoymsla, kubbar | -95.828 | |
| Vøru- og tænastuáogn | 634.318 | -720 |
| Meirvirðisgjaldsáogn | 1.388.368 | 10.891 |
| Broytingar í stuttfreistaðari skuld | | |
| Roknað renta | -2.063.761 | 1.183 |
| Frammanundangoldin tænastugjøld | 1.551.406 | 0 |
| Vøru- og tænastuskuld | -3.050.846 | -19.263 |
| **Gjaldførisúrslit, frá primerum rakstri** | **16.580.376** | **11.887** |
| Rentuinntøkur | 15.186 | 201 |
| Rentukostnaður | -6.047.727 | -9.079 |
| Óvanligar inntøkur | 602.144 | 0 |
| **Gjaldførisúrslit, frá rakstri** | **11.149.978** | **3.009** |
| Íløgur í undirsjóvartunnil | -2.422.049 | -24.609 |
| Íløgur í tøkniogn | -53.580 | -3.877 |
| Íløgur í rakstrartól og innbúgv | -26.663 | -169 |
| **Gjaldførisúrslit, eftir íløgur** | **8.647.686** | **-25.645** |
| Teknaður partapeningur | 20.000.000 | 20.000 |
| Inngjøld, trygd, kubbar | 148.500 | 630 |
| Lántøka, Íleggingargrunnur fyri Føroyar | 0 | 175.000 |
| Umlagt byggilán, Íleggingargrunnurin | 0 | -182.068 |
| Niðurgoldið, lán Íleggingargrunnin | -34.711.134 | 0 |
| **Gjaldførisúrslit, eftir fígging** | **-5.914.947** | **-12.083** |
| Tøkur peningur, primo | 10.207.887 | 22.291 |
| **Tøkur peningur, ultimo** | **4.292.940** | **10.208** |

## NOTUR TIL ROKNSKAPIN

**Nota 1. Starvsfólkakostnaður**

| | 2004 | t.kr. 2003 |
|---|---|---|
| Lønir | 2.375.676 | 2.168 |
| Eftirlønir | 234.964 | 243 |
| Almenn lønargjøld | 37.575 | 29 |
| Starvsfólkakostnaður | 33.501 | 25 |
| | **2.681.716** | **2.466** |
| Harav til | | |
| Stjórn | 308.252 | 312 |
| Nevnd | 146.880 | 216 |
| Ársverk felagið hevur havt er umleið | 7,75 | 7,5 |

| **Nota 2. Materiell støðisogn** | Lendi, vegir og undirsjóvartunnil | Tøkni og maskinur | Rakstrartól og innbúgv |
|---|---|---|---|
| Virði 01.01.2004 | 299.357.683 | 4.179.681 | 790.924 |
| Tilgongd 2004 | 2.422.049 | 53.580 | 26.663 |
| Frágongd 2004 | 0 | 0 | 0 |
| Virði 31.12.2004 | 301.779.732 | 4.233.261 | 817.586 |
| Avskrivingar 01.01.2004 | -11.075.289 | -973.193 | -243.396 |
| Avskrivingar 2004 | -11.337.399 | -850.693 | -126.295 |
| Avskrivingar 31.12.2004 | -22.412.688 | -1.823.885 | -369.691 |
| **Bókført virði 31.12.2004** | **279.367.044** | **2.409.375** | **447.895** |
| Bókført virði 31.12.2003 | 288.282.394 | 3.206.488 | 547.527 |

| | | | | t.kr. |
|---|---|---|---|---|
| **Nota 3. Partapeningur** | | | 2004 | 2003 |
| Partapeningurin er býttur upp í hesar flokkar: | | | | |
| 1 A-partabræv á | 20.300.000 | | 20.300.000 | 20.300 |
| 6 A-partabrøv á | 20.000.000 | | 120.000.000 | 100.000 |
| | | | **140.300.000** | **120.300** |
| Øll partabrøvini hava eins rættindi. | | | | |
| | | | | |
| **Nota 4. Eginpeningur** | | | | |
| Partapeningur | | | 140.300.000 | 120.300 |
| Flutt úrslit frá undanfarnum árum | | | -2.950.647 | 410 |
| Frammanundangoldin, kunnahald 12/12-2002-31/12-2003 | | | 0 | -2.260 |
| Fluttur partur av úrslitinum í árinum | | | 359.741 | -1.100 |
| Flutt úrslit | | | -2.590.906 | -2.951 |
| **Eginpeningur tilsamans** | | | **137.709.094** | **117.349** |
| | | | | |
| **Nota 5. Skattur** | | | | |
| Útsettur skattur áhvílir: | | | | |
| Materiell støðisogn | | | **106.848** | **0** |
| Goldið í árinum: | | | | |
| Partafelagsskattur fyri síðsta ár | | | **0** | **0** |
| | | | | |
| | Restskuld | Fellur | Restskuld | Restskuld |
| | 31.12.2004 | innan 1 ár | eftir 5 ár | 31.12.2003 |
| **Nota 6. Veðskuld** | | | | |
| Íleggingargrunnurin fyri Føroyar | **141.364.475** | **32.500.000** | **52.000.000** | **175.000** |

Við verandi lánisáttmála við árslok 2004.

| **Veð- og eventualskyldur** | Veð lýst í | Veðupphædd |
|---|---|---|
| 1. Veð Skbr. Íleggingargrunnurin, | matr.nr. 401b Kvívík | 200.000.000 |
| 1. Veð Skbr. Íleggingargrunnurin, | matr.nr. 373e Sandavágur | 200.000.000 |
| 1. Veð Skbr. Íleggingargrunnurin, | leysafæ, tekninskur útbúnaður | 200.000.000 |
| | | **600.000.000** |

**Eventualskyldur**

Øll teknað hald hava rindað eina trygd á kr. 300 fyri kubban, ið fæst aftur, um kubbin verður latin inn aftur til felagið.

Felagið hevur, 14. august 2002, undirskrivað ískoytisavtalu til leigusáttmála um leigu av skrivstovuhølum í Havn fram til 1. juli 2007 við 3 mánaði uppsagnartíð, tó í fyrsta lagi 1. apríl 2007.

Felagið hevur undirskrivað tænastusáttmálar fyri røkt av vegum, undirsjóartunli og útgerð pr. 14. februar 2005 fyri 1,3 mió.kr. árliga.

**Tryggingarviðurskifti**

| | |
|---|---|
| All Risk-trygging: | |
| Skaða á tunnil-/útgerð | 25.000.000 |
| Rakstrartap | 5.000.000 |
| Virkisábyrgdartrygging: | |
| Skaða á persón | 70.000.000 |
| Skaða á lutir | 15.000.000 |
| Ábyrgdartrygging: | |
| Ábyrgd nevnd- og stjórn pr. skaða/ár | 10.000.000 |
| Leysafætrygging: | |
| Skrivstovuinnbúgv og útgerð | 230.000 |
| Telduútgerð og tøkni | 270.000 |

Bilarnir eru ábyrgdar- og skrokktryggjaðir. Hjálparfólka- og ferðatrygging er teknað.